# SMART

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*




## Taskur úr lýsingum

Burðardygd er í hásæti, eisini tá umrædur sniðgeving. Fyritøkan, grünBAG, endurnýtur avlopstilfar frá stórum donskum fyritøkum til smartar taskur. grünBAG samstarvar við eitt nú Nordisk Film, Q8 og Rockwool um at endurvinna gamlar reklamu- og biografbannarar.



## Radio-ga-ga

P1. Klassisk på 2'eren. BBC radio. Poppur á Luxenburg. Ella hvat við Radio Kabul? Eg elski mítt internetradio, har eg bara eri eitt lítið klikk frá øllum heimsins útvarpsrásum. Tað, einasta, ið krevst fyri at hoyra Internetradio, er tráðleyst internetsamband, so hevur tú allan heimin inni í stovuni. Fantastiskt!

## Fix matpakkaloysn

Legg allan viðskera, tú brúkar til dagligt, í eina lufttætta box. Nú er nógv skjótari at taka úr køliskápinum og at seta upp á pláss aftur. Serliga er hetta ein góður tíðarsparari, tá matpakkarnir verða smurdir um morgunin.





## Nú hongur taskan væl

Nú er ikki longur neyðugt at blaka taskuna á gólv ella at heingja hana á stólaryggin, tá tú fert út. Hav altíð taskukrókin AHook í taskuni, og krøk hann so á borðkantin, tá tú fert til borðs. Snøgt og smart frá www.ampstar.dk

## Hóska saman sum koppur og kanna

Lat kókað vatn og te í kannuna, sum tú síðani setir á koppin at trakta. So verður koppurin so deiliga heitur. Tea-for-One er navnið á nýggja koppastellinum frá Quantum. Vel títt persónliga sett millum tey 16 ymisku hondmálaðu mynstrini. www.quantum.eu




